

*-Skalt tú finna pressarar millum teir ungu, so eru tað teir, sum byrjaðu sum 15-16 ára gamlir, og ikki teir sum byrjaðu sum 18-20 ára gamlir. Um orsøkin var, at teir 18-20 ára gomlu hava sitið ov leingi og droymt í skúlanum og fingið skaða av tí ella tað er okkurt annað, tað veit eg ikki.*

*Mynd: Bárður Lydersen*

# Útbúgvingætlanin á vestfallið

**Fólkaflokstingmaðurin og samgongulimurin, Kjartan Joensen, heldur lítið um umfatandi útbúgvingarætlanirnar hjá landsstýrinum. -Jú vit skulu hava útbúgvið fólk, men eiga vit ikki ansa okkum at pumpa studning niður í tey lesandi? Hetta kann lætt gerast ein koddi fyri mong. Ja mong blíva ongantíð liðug at lesa. Lat tey lesa sum vilja tað, men tað mugu tey gera við egnari ábyrgd, segði eysturoyartingmaðurin á løgtingi hósdagin.**

LØGMANSRØÐU-VIÐGERÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

-Gamaní kann sigast, at útbúgving er besta íløgan, sum menniskjan og samfelagið kunnu gera í framtíðina. Men Harragud, vit hava einki annað gjørt enn útbúgvið okkara ungdóm tey seinastu í minsta lagi 30 árini. Tað er upp á tíðina, at vit fara at hyggja, hvat samfelagið hevur fingið afturfyri íløguna í útbúgving av okkara ungu.

Hann legði ikki fingrarnar ímillum í løgtingssalinum hósdagin. Rokskiparin og reiðarin úr Leirvík , Kjartan Joensen. Meðan løgtingslimir undir viðgerðini av løgmansrøðuni hava staðið á rað og hálovað ætlanini hjá landsstýrinum um at raðfesta útbúgving fremri enn nakrantíð, er eysturoyartingmaðurin hjá Fólkaflokkinum varin.

Kjartan Joensen setir stórt spurnartekin við, hvør skal rinda fyri útbúgvingarætlanini hjá løgmanni. Hann spurdi retoriskt, hvørji fólk skulu arbeiða og breyðaføða køstaflugurnar, eftir allir føroyingar, sambært løgmanni, skulu hava miðnáms- og yrkisútbúgving og helvtin skal hava akademiska útbúgving.

-Løgmaður nemur við, at ikki fyri nógvum árum síðan var almenna hugsanin, at eftir loknan fólkaskúlaso byrjaði lívið. Ja tað er rætt. Eg haldi í hvussu so er, at tað er helst tað, sum haltar og er sjúkt við okkara samfelag í dag. Eingi ella nógv ov fá byrja at arbeiða sum ung. Byrja at skapa nakað, byrja at framleiða, segði Kjartan Joensen í løgtinginum hósdagin.

Leirvíkingurin legði afturat, at hann persónliga hevði verið nógv saman við ungdómi, og myndin var greið:

> “ *-Tað er nógv betur at fara út um landsoddarnar at nema sær útbúgving enn at fara á Debesartrøð fyri síðan upp á skift at útnevna hvønn annan til doktara av hesum ella hasum. Er hetta ikki oyslan av fólksins skattakrónum ?* ”

-Skalt tú finna pressarar millum teir ungu, so eru tað teir, sum byrjaðu sum 15-16 ára gamlir, og ikki teir sum byrjaðu sum 18-20 ára gamlir. Um orsøkin var, at teir 18-20 ára gomlu hava sitið ov leingi og droymt í skúlanum og fingið skaða av tí ella tað er okkurt annað, tað veit eg ikki. Tað kundi verið áhugavert at funnið út av, men tað er bara veruleikin, vísti vinnulívsmaðurin úr Leirvík á.

## Egin ábyrgd

Kjartan ásannaði í røðu síni, at føroyska samfelagnum kortini tørvar útbúgvið fólk. Hann helt fyri, at útbúgving er góð og neyðug, men hann dugdi illa at fáa eyga á, at útbúgving er lív ella deyði um tú skalt náa tindinum her í lívinum.

> “ *-Fyri at fáa úrslit, so krevst vilji - so krevst nærlagni. Hetta fært tú hvørki úr Hoydølum ella av Kambsdali, men bara heimanifrá, frá ættfedrum tínum* ”

-Fyri at fáa úrslit, so krevst vilji-so krevst nærlagni. Hetta fært tú hvørki úr Hoydølum ella av Kambsdali, men bara heimanifrá, frá ættfedrum tínum, helt Kjartan Joensen.

-Jú vit skulu hava útbúgvið fólk, men eiga vit ikki ansa okkum at pumpa studning niður í tey lesandi? Hetta kann lætt gerast ein koddi fyri mong. Ja mong blíva ongantíð liðug at lesa. Lat tey lesa sum vilja tað, men tað mugu tey gera við egnari ábyrgd, vísti eysturoyartingmaðurin á.

## Út um landoddarnar

Kjartan Joensen var eisini rættiliga ivingarsamur um ætlanina hjá landsstýrinum við at seta ein lærdan háskúla á stovn. Hann mælir ungum føroyingum, ið velja at nema sær eina hægri útbúgving, at fara út um landoddarnar.

-Tað er nógv betur at fara út um landsoddarnar at nema sær útbúgving enn at fara á Debesartrøð fyri síðan upp á skift at útnevna hvønn annan til doktara av hesum ella hasum. Er hetta ikki oyslan av fólksins skattakrónum ?, spurdi Kjartan Joensen í løgtinginum.

## Løgmansrøðan

Ein av grundarsteinunum undir visjón 2015, sum løgmaður kunngjørdi ólavsøkudag, er útbúgving. Løgmaður vísti á, at útbúgving og vitan verða avgerandi fyri hvussu vit megna at møta framtíðar avbjóðingum.

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at ein útbúgv-ingarreformur skal fáast í lag. Reformurin er rættiliga umfatandi.

Millum átøkini er at endurskoða miðnámsútbúgvingarnar, at ein dygdarmeting av fólkaskúlanum, styttri útbúgvingar fyri arbeiðsleys og eina lærdan háskúla, sum skal fevna um hægri útbúgvingarnar á Fróðskaparsetrinum, útbúgving til sjúkrarøktarfrøðingarnar, lærarar og pedagogar eins og hægri útbúgvingarnar á Handilsskúlanum.

**FAKTA**

### Ætlanin hjá landsstýrinum

Nøkur av málunum á útbúgvingarøkinum:

- Allir fólkaskúlanæmingar fáa eina góða og mennandi grundútbúgving, sum tryggjar, at teir hava førleika at fara víðari til eina miðnámsútbúgving
- Allir ungdómar fáa eina miðnámsútbúgving ella yrkisútbúgving
- Minst helvtin av okkara ungdómi fær hægri útbúgving